## Berbatov er verdur 400 milliónir

Venjarin hjá enska felagnum Tottenham heldur, bulgarski spælarin hjá liðnum, Dimitar Berbatov, er verdur einar 300 ella 400 milliónir krónur. Berbatov kom til Tottenham síðsta summar, og tá gav Tottenham 117 milliónir krónur fyri spælaran. Berbatov hevur tó víst stórspæl í síni tíð í Tottenham, og Martin Jol heldur, at Berbatov mest av øllum líkist hollendska stórspælaranum Johan Cruyff. Berbatov hevur meira enn trý ár eftir av sínum sáttmála við Tottenham.

## Sylla aftur í B36

Tað var ein dyggur smeitur, tá Amed Davy Sylla fyri lítlum manaði siðani segði, at tað bar illa til hja honum at spæla fótbólt í Føroyum í ár. Orsøkirnar til hetta voru persónligir. Spæliloyvið hevur to alla tiðina verið í B36, og nú tykist ein loysn vera funnin á trupulleikanum.

- Eg kann vátta, at Sylla verður við flogfarinum týsdagin, og at hann fer at spæla við B36 í ár. Tað merkir, at vit nú hava tann hópin, sum vit høvdu ætlað okkum í ár, sigur Kristjan a Neystabø, stjóri í FC Tórshavn.

Sum skilst, so inniber loysnin millum annað, at Sylla fær loyvi at ferðast til Fraklands, tá steðgur er í landskappingini av landsliðsávum ella øðrum.



# hjá fuglfirðingum






*Talan var um stóran dag, nú bæði FM-heitini í meistaradeildunum í flogbólti endaðu hjá ÍF*

omaná. Hetta settið vann ÍF 25-22, og nú byrjaðu fuglfirðingarnir veruliga at tevja gull.

### Servirnar vóru avgerandi

Fyrstu tvey settini hevði ÍF verið nógv betra liðið, og tað var fult uppiborið, at tær høvdu vunnið hesi bæði settini. Tær tóktust vera sterkari í móttøkunum, og so var álopið meir fjølbroytt. Serliga Helen avgjørdi nógvar bóltar, men eisini útlendingar, Mirella, stóð rættiliga sterk í myndini í álopinum.

SÍ tóktist hinvegin at spæla nógv uppá Karin Mikkelsen, og hetta gjørdi, at ÍF hevði rættiliga lætt við at lesa spælið hjá SÍ. Kvinnurnar hjá SÍ tóktust eisini at vera heldur meir ávirkaðar av nervum enn leikararnir hjá ÍF, men hetta er helst ikki so løgið, tí ÍF hevur nógvar royndar leikarar á liðnum, meðan SÍ hevur eitt ungt lið við eini sera góðari framtíð.

Ein av størstu mununum fyrstu tvey settini vóru tó servurnar. ÍF servaði ótrúliga væl, og tær løgdu stórt trýst á SÍ við servunum. Hetta gjørdi, at móttøkurnar hjá sørvingunum ikki vóru so góðar, og tá gjørdist arbeiði hjá hevaranum, Annika á Stongum, ikki ov lætt.

### ÍF vann meistaraheitið

Í triðja setti var bert eitt at gera hjá gestunum úr Sørvági. Um tær skuldu hava nakran møguleika at vinna meistaraheitið, so skuldi hetta settið fyrst og fremst vinnast.

Triðja sett bleiv tó ongantíð spennandi. Nú var ÍF nógv betri, og tær vunnu sær eisini eina góða leiðslu tíðliga í settinum. So við og við vaks munurin, og tá ÍF legði seg á odda 23-15 byrjaðu fleiri av áskoðarunum at syngja "Vit eru føroyameistarar." Teir byrjaðu helst at feira sigurin heldur tíðliga, men her var snøgt sagt eingin ivi henda dagin. ÍF vann nevniliga ein knúsandi 25-18 sigur í triðja setti, og so lupu áskoðararnir inn á vøllin í einum gleðisrúsi. Kvinnurnar hjá ÍF vóru føroyameistarar í flogbólti, og sigurin hjá teimum var fult uppiborin henda dagin.

Skuffilsi hjá SÍ-leikarunum var sjálvandi stórt, men SÍ má sigast at hava havt eitt avbera gott kappingarár, og hava tær sama fólk komandi kappingarár, so er ikki óhugsandi, at tær kunnu røkka enn longur.

Sæð yvir alt kappingarárið er ÍF helst rætti føroyameistarin. Úrslitini hava verið rættiliga støðug, og so hava tær ligið í oddinum allan vegin. Tryggi sigurin í seinasta dystinum vísti eisini, at á degnum høvdu tær meir at geva av enn SÍ.

### Meistaraheitið var tryggjað

Hjá monnunum var longu greitt undan seinasta dystinum, at ÍF hevði vunnið meistaraheitið, og tí var spenningurin ikki líka stórur undan hesum dystinum. Áskoðararnir vóru eisini færri í tali, men nakrir vóru tó verandi í høllini at heppa á mansliðini.

ÍF stillaði í sterkastu uppstilling, tá liðini fóru undir fyrsta sett, og teir byrjaðu eisini sum eitt satt ódnarveður. Teir løgdu seg á odda 12-2 beinanvegin, men so valdu teir at lata nakrar av yngru leikarunum sleppa á vøllin. Nú kom SÍ nógv betri við í settið, og móti endanum var eisini nær við, at SÍ fekk ÍF aftur. ÍF vann tó fyrsta sett uppiborið 25-21.

Í øðrum setti valdi ÍF at byrja við fleiri av eykaleikarunum inni, og hetta settið bleiv eisini heldur meir spennandi. Nú var SÍ betri við fyrstu løtuna, men sum settið leið, dró ÍF frá gestunum. Móti endanum hevði ÍF vunnið sær eina rættiliga tryga leiðslu, og her var eingin ivi um, at teir eisini fóru at vinna annað sett. Úrslitið av hesum gjørdist 25-19 til ÍF, og nú vóru teir veruliga á sigurskós.

### SÍ vildi eisini spæla við

Í triðja setti byrjaði ÍF mest sum bert við eykaleikarum á vøllinum, og nú var tað brádliga SÍ, sum setti seg á dystin. Teir løgdu seg á odda mest sum alt fyri eitt, og munurin bara vaks og vaks.

Í hesum settinum var einki at ivast í, at SÍ var nógv tað betra liðið, og serliga ein leikari skaraði fram úr.

Jóhan Petur á Stongum spælir vanliga libero á føroyska landsliðnum, men á liðnum hjá SÍ spælir hann úti á kantinum. Sjálvt um hann ikki er av størstu monnum, so megnaði hann í fleiri førum at sláa fram við sterka blokkinum hjá ÍF, og hann spældi ein sera góðan dyst leygardagin. Hann var tó ikki bara sjónligur í álopspartinum, tí í verjupartinum var hann ótrúliga. Hann var mest sum allastaðni, og til tíðir fekk hann teir mest ótrúligu bólarnar upp av gólvinum.

Móti endanum av hesum settinum valdi ÍF at skifta fleiri av stuðulsleikarunum inn aftur, men ov seint var. Munurin var ov stórur, og hetta settið vann SÍ trygt, 25-18.

### Stórur dagur hjá ÍF

Í fjórða setti byrjaði ÍF aftur við sterkasta liðnum, og nú sá betur út hjá teimum. Teir løgdu væl fyri og vunnu seg rættiliga trygt fram um fyrstu løtuna, og er var alt, sum bendi á, at ÍF fór at avgera dystin í hesum settinum.

Munurin gjørdist eisini størri og størri, og at enda var eingin sum helst ivi um, at ÍF fór avstað við sigrinum. Teir vunnu eisini fjórða sett 25-19, og sostatt fingu teir eisini ein sigur í seinasta dystinum í meistaradeildini hjá monnum.

Sum heild var hetta ein stórur dagur hjá flogbóltinum í Fuglafirði. Menninir høvdu longu vunnið meistaraheitið undan dystinum ímóti SÍ, og í allar seinasta dystinum megnaðu kvinnurnar eisini at vinna meistaraheitið við sigrinum á størstu rivalunum úr SÍ. Gullheiðursmerki í meistaradeildini hjá monnum og hjá kvinnum má metast at vera avbera flott av ÍF.

## Úrslitini

| | |
|---|---|
| **Meistradeild kvinnur:** | **ÍF-SÍ 3-0 (25-20, 25-22, 25-18)** |
| **Meistaradeild menn:** | **ÍF-SÍ 3-1 (25-21, 25-19, 18-25, 25-19)** |

## Síðsti dystur hjá Randi

Eftir dystin millum ÍF og SÍ fingu vit orðið á ein mest royndu leikarunum á ÍF-liðnum, Randi Larsen. Randi helt, at sigurin var fult uppiborin.

- Vit vóru væl innstillaðar uppá dystin, og vit vistu júst, hvat vit skuldu gera. Hetta riggaði til fulnar í dag. Vit høvdu gjørt av áðrenn dystin, at nýta styrkina hjá okkum í servunum, og hetta vísti seg eisini at rigga væl. Vit spæla tær út í servunum, og teirra álop riggar slett ikki, tí at servurnar hjá okkum sótu so væl.

Randi hevur verið ein av berandi kreftunum á besta kvinnuliðnum hjá ÍF í fleiri ár, men í dystinum ímóti SÍ var hon slett ikki á vøllinum. Hetta passaði henni tó fínt.

- Tað er gott, at yngri leikarar eru klárir at taka yvir eftir meg og aðrar, so tað passaði mær fínt at vera uttan fyri í dystinum í dag.

Spurd, um hetta so eisini fór at gerast hennara seinasti dystur fyri besta kvinnuliðið hjá ÍF, var hon avgjørd á málinum.

- Ja, hetta verður heilt víst mín seinasta dystur. Avgerðin er tikin, og hon stendur ikki til at broyta. Eg ætli mær tó at venja eina ferð ella tvær ferðir um vikuna enn, um eg klári, og so ætli eg kanska at taka mær av onkrum yngri leikarum ella liðum, staðfesti Randi eftir sigurin á SÍ.